**Upprit**

til løgtingsformannin viðvíkjandi áheitan um setan av kanningarstjóra

15 tingmenn hava við skrivi, móttikið 25. okt. í ár, heitt á løgtingsformannin um at seta ein kanningarstjóra at kanna trinni ymisk evni:

1. Útluting av fiskirættindum í 2020 og 2021
2. Kvotutillutingar í 2018 og 2019
3. Útluting av fiskirættindum í tíðarskeiðnum 2010-2018

*Lógargrundarlagið*

Sambært Stýrisskipanarlógini, § 38, stk. 2 kann landsstýrismálanevndin krevja, at kanningarstjóri verður settur, um *illgruni er um, at óregluliga hevur verið atborið.* Kanningarstjórin hevur ikki dómsmyndugleika, men skal eftir at málið er kannað, lata Løgtigninum ein frágreiðing um, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt. Sama rætt at seta fram krav um kanningarstjóra kunnu tveir fimtingar av tingmonnum (tvs. 14 tingmenn) nýta sbrt. § 38, stk. 2, 3. pkt.

Henda kanningarstjóraumbønin er serlig á tann hátt, at hon ikki bara biður um, at kanningarstjóri verður settur at kanna eitt ávíst mál ella samanhangandi mál (ávíst tíðarskeið), men at hon er býtt upp, eins og gjørt er. Tí er natúrligt at seta spurningin, hvørt hetta ber til, ella um tað er hetta, sum endamálið við kanningarstjóraskipanini er ætlað til.

Endamálið við slíkari kanning er sambært lógini at fáa staðfest, um ein illgruni um, at skeivt er borið at, er rættur, og at frágreiðingin frá kanningarstjóranum til Løgtingið síðan kann nýtast sum grundarlag hjá tinginum at meta um, hvørt eitt mál skal fáa rættarligar ella politiskar avleiðingar.

*Útluting av fiskirættindum í 2020 og 2021*

Umsitingin í tinginum er ikki í iva um, at umbønin um setan av kanningarstjóra lýkur treytirnar fyri hesum, tá talan er um útlutingina av fiskirættindum í 2020 og 2021. Ført hevur verið fram í politisku skipanini og í fjølmiðlunum, at landsstýrismaðurin m.a. ikki hevur fylgt tilráðingini frá umsiting sínari, men hevur tikið avgerðir grundaðar á egnar metingar. Uttan mun til, um avgerðirnar hjá landsstýrismanninum eru rættar ella skeivar, má metast, at kravið um, at ein illgruni skal vera til staðar, tí er lokið.

*Kvotutillutingar í 2018 og 2019*

Umsitingin í tinginum hevur eitt sindur verri við at síggja, at kravið um ein kanningarstjóra, grundað á ein illgruna um óreglusemi, er eins greitt, tá ræður um kvotutillutingarnar í 2018 og 2019. Talan er um, at verandi manningar fyri táverandi samgonguflokkarnar nú biðja um eina kanning av teirra egnu umsiting í 2018 og 2019. Spurningurin er uttan iva áhugaverdur, men umsitingin ivast stórliga í, um tað er endamálið við einum kanningarstjóramáli, at fyrrverandi samgongur skulu kunna krevja ein kanningarstjóra fyri at kanna tær sjálvar. Røddir vóru eisini frammi í politisku skipanini tá um, at umsitingin kanska ikki var í lagi, men táverandi løgting valdi ikki at gera meira við hetta.

01 DEC. 2021
LØGTINGIÐ
J.nr.: 1111-20210001-2

*Útluting av fiskirættindum í tíðarskeiðnum 2010-2018*
Umsitingin í Løgtinginum hevur ilt við at síggja, hvørjum endamáli ein kanningarstjórakanning av umsitingini av fiskivinnuni í 2010-18 skal tæna, tá endamálið við hesari sambært lógini er at staðfesta, um grundarlag er fyri møguligum politiskum ella rættarligum avleiðingum nú. Fyri tað fyrsta verður ikki víst á nakað ávíst mál, har illgruni nú er reistur, men eitt ynski um at kanna alla umsitingina av fiskivinnuni tá, fyri at vita, um alt var í lagi ella um okkurt var skeivt. Um ein kanningarstjóri skuldi komið fram á onkran feil frá teirri tíðini, dugir umsitingin illa at ímynda sær, at hetta kundi ført til politiskar ella rættarligar avleiðingar í dag. Rættarlig ábyrgd vildi helst verið fyrnað, og politisk ábyrgd og avleiðing uml. 10 ár seinni, við fleiri millumliggjandi valum, er ikki sannlík.

Eins og nevnt viðvíkjandi tíðarskeiðnum 2018-19, kundi tað uttan iva verið áhugavert at lýst hetta, men umsitigin í Løgtinginum heldur, at tað so heldur er talan um eitt mál fyri eina møguliga §19-nevnd at lýsa, heldur enn um ein kanningarstjóra. Sambært § 19 í Stýrisskipanarlógini kann Løgtingið seta eina nevnd av tingmonnum at kanna alment umvarðandi mál. Tað er ein treyt fyri setan av slíkari nevnd, at talan er um almenn týðandi ella alment umvarðandi mál, sum skal kannast. Hvussu umsitingin av fiskivinnupolitikkinum og lóggávuni hevur verið upp gjøgnum tíðirnar, er uttan iva eitt mál fyri eina slíka nevnd at kanna, heldur enn fyri ein kanningarstjóra, havandi í huga, hvønn týdning hetta økið hevur og hevur havt fyri samfelagið.

*Formliga áheitanin frá tingmonnunum*
14 tingmenn kunnu krevja, at løgtingsformaðurin setir ein kanningarstjóra at kanna ávíst mál. Men tað er løgtingsformaðurin einsamallur, sum síðan ger kanningarsetningin við støði í umbønini, finnur skikkaða kanningarstjóran og avtalar við hendan, hvør karmurin er fyri kanningina, bæði í tíð og kostnaði. Við støði í hesum biður løgtingsformaðurin síðan Løgtingið um játtan ella eykajáttan at fremja kanningina.

**Tilmæli**
Løgtingsumsitingin mælir løgtingsformanninum til at fara undir at seta ein kanningarstjóra at kanna útlutingina av fiskirættindum í 2020 og 2021. Hinvegin kann umsitingin ikki mæla til at seta nakran kanningarstjóra at kanna hini bæði økini, sum biðið verður um. Tað er natúrligt, at løgtingsformaðurin tekur ein fund við umboð fyri tingmenninar at greiða frá hesum.

Løgtingið, alla halganna dag 2021

Johnhard Klettheyggj
løgtingsstjóri